# Nú kann byggjast

Innlendismálaráðið hevur góðkent endurskoðaðu almennu byggisamtyktina fyri Klaksvíkar kommunu- Tað hevur verið bíðað eftir góðkenningini frá Innlendismálaráðnum í rúma tíð, men mikudagin 17. september bragdaði loksins. Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu eisini nevnd býarplanur er nú samtykt, og hetta merkir, at fleiri arbeiðir í kommununi sostatt kunnu fara í gongd. Endamálið við býarplaninum er at leggja karmar fyri framtíðar bygging í Klaksvíkar kommunu, har býarplanurin er eitt amboð til at seta kósina og stýra menningini av býi og bygdum kommununnar, skrivar klaksvik.fo.



# Tanja vann ferðaseðil á JobMatch

Umboð fyri Tórshavnar kommunu hava higartil havt rættiliga nógvar samrøður við lesandi og aðrar útisetar, ið eru áhugaðir í at venda heim. Lutakast var millum tey, ið hava meldað seg til sonevnt jobprát á ráðstevnuni, og gjørdist hepni vinnarin Tanja Jacobsen. Hon vann ein ferðaseðil frá Atlantic Airways til eina ferð millum Føroya og Danmark, sum Heðin Mortensen, borgarstjóri handaði henni á básinum hjá Tórshavnar kommunu.



# Tingnevndirnar valdar



*Anfinn Kalsberg , formaður í fíggjarnevndini*



*Katrin Dahl Jakobsen, formaður í vinnunevndini*



*Magni Laksáfoss, formaður í mentanarnevndini*



*John Johannesen, formaður í uttanlandsnevndini*



*Jákup Mikkelsen, formaður í trivnaðarnevndini*



*Alfred Olsen, formaður í rættarnevndini*

**Løgtingið hevur í dag valt tingnevndirnar av nýggjum. Vert er at nevna, at Vinnunevndin fekk ein kvinnuligan formann**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú nýtt landsstýri hevur tikið við, eru tingnevndirnar valdar av nýggjum. Tær síggja nú soleiðis út (varalimir í klombrum)

**Fíggjarnevnd:**
1. Anfinn Kalsberg (Jógvan á Lakjuni)
2. Eyðgunn Samuelsen (Mikkjal Sørensen)
3. Bill Justinussen (Jenis av Rana)
4. Magni Laksáfoss (Helgi Abrahamsen)
5. Bjørn Kallsø (Marjus Dam)
6. Tórbjørn Jacobsen (Heini O. Heinesen)
7. Annita á Fríðriksmørk (Bjørt Samuelsen)

**Vinnunevnd:**
1. Katrin Dahl Jakobsen (Gerhard Lognberg)
2. Mikkjal Sørensen (Eyðgunn Samuelsen)
3. Heðin Zachariasen (Poul Michelsen)
4. Bjarni Djurholm (Jógvan á Lakjuni)
5. Kári P. Højgaard (Kári á Rógvi)
6. Bjørn Kallsø (Jaspur Vang)
7. Bjørt Samuelsen (Tórbjørn Jacobsen)

**Mentanarnevnd:**
1. Magni Laksáfoss (Bjørn Kallsø)
2. Kári á Rógvi (Kári P. Højgaard)
3. Jógvan á Lakjuni (Bjarni Djurholm)
4. Óli Breckmann (Heðin Zachariassen)
5. Eyðgunn Samuelsen (Andrias Petersen)
6. Marjus Dam (Helgi Abrahamsen)
7. Sjúrður Skaale (Annita á Fríðriksmørk)

**Uttanlandsnevnd:**
1. John Johannesen (Andrias Petersen)
2. Poul Michelsen (Anfinn Kallsberg)
3. Jógvan á Lakjuni (Óli Breckmann)
4. Jenis av Rana (Karsten Hansen)
5. Kári á Rógvi (Kári P. Højgaard)
6. Høgni Hoydal (Tórbjørn Jacobsen)
7. Edmund Joensen (Helgi Abrahamsen)

**Trivnaðarnevnd:**
1. Jákup Mikkelsen (Heðin Zachariasen)
2. Helgi Abrahamsen (Bjørn Kallsø)
3. Karsten Hansen (Bill Justinussen)
4. Andrias Petersen Katrin D. Jakobsen)
5. Jaspur Vang (Edmund Joensen)
6. Tórbjørn Jacobsen (Annita á Fríðriksmørk)
7. Bergtóra H. Joensen (Bjørt Samuelsen)

**Rættarnevnd:**
1. Alfred Olsen (Marjus Dam)
2. Mikkjal Sørensen (Eyðgunn Samuelsen)
3. Anfinn Kalsberg (Jógvan á Lakjuni)
4. Poul Michelsen (Jákup



*Jaspur Vang, formaður í landsstýrismálanevndini*

Mikkelsen)
5. Gerhard Lognberg (John Johannesen)
6. Bjørt Samuelsen (Sjúrður Skaale)
7. Heini O. Heinesen (Bdergtóra H. Joensen)

**Landsstýrismálanevnd:**
1. Jaspur Vang (Helgi Abrahamsen)



*Jenis av Rana, limur í Norðurlandsráðnum*

2. Andreas Petersen (Eyðgunn Samuelsen)
3. Annita á Fríðriksmørk (Høgni Hoydal)

**Norðurlandaráðið:**
Jenis av Rana
Katrin Dahl Jakobsen